Scania R-serie:

# Nýggjur og framkomin Scania lastbilur



*Nýggi Scania R líkist nógv forgangaranum, men fyri ein rutineraðan lastbilaførara er stórur munur at merkja*

**Tað er ikki á hvørjum degi at nýggir lastbilar koma á marknaðin, men stutt fyri páskir komu Scania við eini nýggjari R-seriu. Hóast bilurin er ein eyðkendur Scania at síggja til, er talan um ein heilt nýggjan lastbil**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Lastbilar og bussar eru so framkomnir nú á døgum, at verksmiðjurnar alla tíðina mugu menna nýggja tøkni og vera fyrst við tí nýggjasta, um teir skulu vera við í hørðu kappingini um kundarnar.

Nýggi Scania R avloysir 4-seriuna, sum hevur verið á marknaðinum síðan 1996. At síggja til eru ikki tær stóru broytingarnar, men talan er um ein framkomnan bil við nógvum tekniskum og tøkniligum loysnum.

Trý ymisk førarahús í trimum ymiskum hæddum eru at velja ímillum, men felags fyri tey øll er, at tey hava tvær koyggjur aftan fyri setrini.

Instrumentborðið er nú enn meira egonomiskt rætt, soleiðis at kontaktir og handtøk sita sera væl fyri hjá bilføraranum. Eisini setrini eru munandi betri enn hjá forgangaranum. Um bilførarin t.d. tekur startlykilin úr uttan at aktivera hondbremsuna, sigur eitt ávaringarljóð frá.

Scania R hevur nýggjastu og mest framkomnu bremsuskipanina EBS (Elektronic Brake Systems). Anars hevur hann eisini EBS, sum altíð gevur sama bremsuvirkning við sama pedaltrýst, líkamikið hvussu bilurin er lastaður. Umframt hevur hann eisini ESP (Elektronisk Stabiliserings Program), sum kann vera við til at halda bilinum á rættari kós, um hann t.d. glíður út í einum svingi.

Motorarnir eru teir somu við undantak av eini Euro-4 útgávu av 12 liturs motorinum við 420 hk og einum 16 liturs V8 við 500 hk. Motorarnir lúka tey strangastu umhvørviskrøvini.



*Allar útgávurnar hava nú tvær koyggjur aftan fyri setrini*

FDM test:

# Bridgestone og Michelin stóðu seg væl

**FDM gjørdi herfyri eina test av fleiri ymiskum summardekkum í tveimum ávísum støddum. Bridgestone og Michelin stóðu seg sera væl hesi test**

DEKK
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Í eini kanning sum FDM gjørdi av fleiri ymiskum summardekk vóru tað nøkur dekk sum fingu fimm stjørnur. Í støddini 165/70-14 vóru tað Bridgestone B330 EVO, Continental EcoContakt 3, og Michelin Energy E3A sum vunnu.

Í støddini 205/55-16 vóru tað Brigdestone Potenza RE 720, og Micheilin Pilot Exalto PE2 sum vunnu testina.

Kanningin var gjørd í samstarvi við ADAC í Týsklandi.

Her hjá okkum er tað Dekkcentrið í Havn, sum umboðar Bridgestone og Michelin dekkini.

Í sambandi við hesa testina skriva FDM eisini, at tey bestu dekkini altíð skulu vera aftan - sama um bilurin verður drivin av fram- ella bakhjólunum.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg- Leðurinntrekk- Sóltak- El-rútar- El-spegl- Fjarstýrt Centrallás- Radio- Alufelgur- Spoylarar v.m. Sertilboð kr. 198.000,00. Kr. 220.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Okt. 1997, Km 159.000. El-rútar. fr.- Valnød Instrumentbretti- Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 66.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Aircondition- Alufelgur-Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v.Reduktiónsgear - Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl- C.D.Anlegg v.m. Kr. 128.000



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Vælhildin: Centrallás- El-rútar- El-spegl-Radio v.bandspælara v.m. Eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000

P/f D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600**
**Fax 310650**



**HONDA CIVIC 1,6I ES**
Árg árg. 1999, Km 45.000. 5 hurðar, 125 hk, aircondition, el-rútar framman og aftan, el-spegl, sentrallás, CD-spælara v.m. Prísuppskot kr. 109.000. .
**Tel. 215553**






**MAZDA B2500**
Árg 1997, Km 42.000. Kr. 70.000 – 2.5 DX, í góðum standi



**FORD FOCUS**
Árg 2000, Km 67.500. Kr. 148.000 – 1.8 Tdi, sleipikrókur, el-rútar, servostýring, hita í setrum, væl hildin



**FORD FOCUS**
Árg 2002, Km 32.000. Kr. 195.000 – Tdci Ghia, aircondition, servostýring, sentrallás, hita í setrum o.a.



**FORD FOCUS**
Árg 2001, Km 38.000. Kr. 175.000 – 1.8 Tdi, leðursetur, aircondition og mangt annað



**FORD FOCUS**
Árg 2000, Km 76.000. Kr. 125.000 – 1.6i Ghia, væl útgjørdur og í góðum standi



**FORD MONDEO**
Árg 2002, Km 72.000. Kr. 225.000 – 2.0 Tdci 130 hk. sera væl útgjørdur



**FORD MONDEO**
Árg 1996, Km 175.000. Kr. 69.000 – 1.8 Turbo Diesel, sentrallás, servostýring, hita í forrúti og setrum framman o.a.



**FORD MONDEO**
Árg 2000, Km 72.000. Kr. 135.000 – 1.8 Turbo Diesel, servostýring, sentrallás, hita í forrúti og setrum framman



**CITROEN ZX**
Árg 1996, Km 120.000. Kr. 45.000 – 1.9 Turbo Diesel, sentrallás, servostýring o.a. sýnaður 2004



**FORD MONDEO**
Árg 2001, Km 56.000. Kr. 139.000 – 1.8i bensin, fløguspælari, aircondition, servostýring, el-rútar, el-spegl, hita í forrúti og setrum framman



**FORD MONDEO**
Árg 1997, Km 120.000. Kr. 98.000 – 1.8 Tdi, servostýring, sentrallás, elrútar, el-spegl, hita í forrúti, aircondition



**FORD ESCORT**
Árg 1997, Km 64.000. Kr. 57.000 – 1.6i automatgear, servostýring, sentrallás, sportfelgur



**FORD MONDEO**
Árg 2001, Km 54.000. Kr. 198.000 – 2.0 Tdi 115 hk. Sera væl útgjørdur



**FORD FIESTA**
Árg 2000, Km 60.000. Kr. 88.000 – 1.25i bensin, servostýring, sentrallás, fløguspælari, hita í setrum



**NISSAN ALMERA**
Árg 1999, Km 104.000. Kr. 98.000 – 2.0 diesel, sleipikrók, sentrallás, servostýring, el-spegl, el-rútar og fløguspælara



**SEAT CORDOBA**
Árg 1999, Km 106.000. Kr. 85.000 – 1.9 diesel, prísurin er v/mvg. Vælhildin vørubilur



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 2000, Km 32.000. Kr. 118.000 – Aut.gear, fløguspælari, servostýring, el-rútar, hita í setrum, fjarstýrt sentrallás



La880
**MAZDA PREMACY VAN**
Árg 2002, Km 71.000. Kr. 145.000 – 2.0 Tdi van, Centralás, aircondition, servostýring, píkadekk



**FORD MONDEO**
Árg 1999, Km 89.000. Kr. 125.000 – 1.8 TD.servostýring, sentrallás, hita í setrum, elrútar, aircondition, heilársdekk, sýnaður 2003



**VW TRANSPORTER**
Árg 2001, Km 60.000. Kr. 148.000 – 2.4 Diesel. Prísurin er við mvg. Sentrallás, servistýring, í góðum standi



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 1999, Km 46.000. Kr. 99.000 – 2.0i aut. gear, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás, leðursetur, fløguspælara, hundagittar, alufelgur

Ford
**P/f Wenzel**
**AKRANESGØTA 5 TEL 354500 FAX 354501**
**Opið mána- fríggjadag: 8-17, leygardag: 10-14**
**www.wenzel.fo**

